## DAGSINS MEINING

# Meðan bíðað verður

Mánadagurin 17. januar kann gerast søguligur. Í hvussu er tá tað snýr seg um eina komandi føroyska oljuvinnu. Henda dagin verða helst loyvini til at leita eftir olju og gassi í 2. útbjóðing latin feløgunum. Tað er so byrjanin uppá eitt nýtt kapittul í oljuleitingini og kann eisini koma at vera tað, ið skal til fyri at loysa upp í hesum stóra máli, ja sum veruliga setir hol á. Stórtíðindini um eitt gigant oljufund beint hinumegin markið hava av álvara sett alt Atlantsmótið aftur á landakortið. Tað kann so ikki sigast annað enn, at timingin av nýggju útbjóðingini og økjunum, sum eru við har, er perfekt. Somu feløg, sum hava funnið oljuna hinumegin markið, hava eftir øllum at døma søkt um teigarnar okkara megin markið, og sum liggja uppat loyvinum á bretsku síðuni. Og fáa teir helst eisini. Hesi feløgini, ChevronTexaco, Statoil, Dong og OMV, ætla at bora avmarkingarbrunnar á bretska fundinum í summar. Ímynda vit okkum, at hesar boringar eru væleydnaðar og kanska entá loyva okkum at gita, at tann oljukeldan gongur móti føroyska markinum og hvør veit, entá inn á føroyskt øki, tá verður hetta ein týðandi katalysator fyri útviklingingum á okkara øki. Tað kann t.d. hava við sær, at somu feløg fara at skunda undir sínar ætlanir í Føroyum og hugsast kann, at tey kunnu bora brunn í 2. rundu longu í 2006 ella 07.

Hetta skal sjálvsagt takast við fyrivarni. Men órealistiskt er tað ikki. Aftrat hesum l iggja so eisini teir fýra brunnarnir frá 1. útbjóðing og bíða. So vil væl til og oljuprísirnir halda sær kann verulig gongd koma á føroysku oljuleitingina longu í 2006. Hetta eru positiv signal fyri føroyska samfelagið og hvør veit, kanska ein partur av loysnini á stóru trupulleikunum í Suðuroynni m.a. kann vera ein komandi meira virkin oljutilgongd. Tað skal bara eitt stórt fund á føroyska landgrunninum til, at vit av álvara kunnu stinga út í kortið ein útvikling á landi eisini. So kanska er tað ikki ov tíðliga, at politikarar og vinnulívsfólk setaseg saman og so spakuliga fara undir at leggja ætlanir fyri framtíðina. Ein spurningurin vil tá m.a. vera, um oljuútviklingurin her á landi skal stýrast, soleiðis at tað verða ávís øki í landinum, sum eru við at vera niðurundirkomin, ið skulu raðfestast fyrst, tá tað um oljutilgongdina ræður – ella um tað sum higartil skulu vera fríu vinnukreftirnar sjálvar, sum gera av, hvat og hvussu útviklingurin á landi skal vera.

Hvussu og ikki so eiga vit at fegnast um, at enn eitt stórt oljufelag hevur átikið sær leiklut in at vera fyristøðufelag í leitingini her hjá okkum. Um ChevronTexaco hevði valt sekundera leiklutin "bara" at vera partur av samtaki við øðrum operatøri, sum longu er á økinum, so hevði hetta bara verið næstbest fyri leitingina. Nú felagið hevur avgjørt at taka evstu ábyrgdina og fara inn í leitingina við fullum og størsta álvara, kann tað koma at skunda undir útviklingin. Tí verða tað eftir øllum at døma Statoil og ChevronTexaco, sum koma at verður høvuðslokomotini, nú farið verður undir nýggja leiting. Tað fáa vit so at vita mánadagin. Og fyri føroyingar hevur tað eisini áhuga, hvussu fer at gangast føroysku oljufeløgunum í nýggju rundini. Eitt er so tað hvussu feløgini hava megnað at finna saman við øðrum stórum feløgum undan útbjóðingini. Annað er so, um feløgini einsamøll ella saman við øðrum feløgum, hava klárað at fáa onkrar góðar bitar av tí samlaðu køkuni. Og loksins um umsøkjararnir allir verða nøgdir. Time will show.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Á gáttini til kappingarárið 2005

**Bjarki Mohr**
*formaður í Kappingarnevndini*



***Nú neyðugu fyrireikingarnar eru gjørdar til at fara undir eitt nýtt kappingarár í føroyskum fótbólti - í broyttum líki - hava einstakir fótbóltsáhugaðir gjørt viðmerkingar til ætlaðu broytingarnarnar í landskappingini.***

Í fyrstu vikuni av nýggja árinum gevur Petur Simonsen í bløðunum sítt íkast til kjaki um eina broytta landskapping undir heitinum **"Tvey fram og eitt aftur Ð- ella ??"**, og seinni í vikuni gevur eisini Finnur Helmsdal, í Oyggjatíðindi, sína áskoðan til kennar.

Tað er kærkomið, at fólk við stórum áhuga fyri fótbóltinum, geva sítt íkast til kjaki, tí á henda hátt er betur møguleiki fyri at fáa víðka um sjónarringin, samstundis sum vit í varða av, betur koma at kenna fleiri áskoðanirnar. Soleiðis sum eg lesi blaðgreinarnar, er stórur munur á hvørja áskoðan Petur Simonsen og Finnur Helmsdal hava til málið.

Finnur Helmsdal hevur ongantíð fjalt, at hann er talsmaður fyri at skerja talið av liðum í fremstu deildini. Hóast hann ikki tykist heilt nøgdur við tær ætlanir FSF hevur fyri 2005 á økinum, er hansara niðurstøða Ð- í stórum Ð- at broytingarnar eru til tað betra, og at tær koma at viðføra, at talið á liðum í fremstu deildini til seinast enda við at vera millum 6 og 8 lið, og so gerst ikki við, um veðurin hagar verður heldur longur.

Eg fari ikki á hesum sinni, at leggja meg út í kjaki, hvørs tað skulu vera 6, 8 ella 10 lið í fremstu deildini. Hesin spurningur er mangan umrøddur, men hevur higartil ikki fingið undirtøku millum feløgini, hóast hann framvegis er áhugaverdur.

Petur Simonsen, ið eisini hevur áralangar royndir í fótbólti, sigur millum annað í grein sínari, at hann kennir seg ótryggan við at skunda eitt tílíkt mál ígjøgnum, honum vitandi, uttan nakra "breiða" viðgerð í føroyska fótbóltsheiminum. Hann mælir eisini til, at ein arbeiðsbólkur verur settur at evna til eitt álit, ið inniheldur mest týðandi økini, og sum síðani støða kann takast til komandi árini.

Gamaní kundu vit sett ein arbeiðsbólk at arbeitt víðari við málinum, og sum síðani kundi latið eitt álit av hondum til støðutakan, tað hevði neyvan gjørt tilgongdina verri. Men, eg verið tó noyddur at siga, at talan er ikki um nakað nýtt mál. Fremstu venjarar og leikarar okkara hava tosa um júst hesar broytingar í fleiri ár.

Limirnir í Kappingarnevndini hjá Fótbóltsambandinum hava nýtt nógva tíð at viðgera júst ætlaðu broytingarnar, sjálvsagt við tí endamálið at hækka støðið á føroyskum fótbólti.

Allir teir yvaspurningar - ið Petur Simonsen nevnir, og sum eru sera viðkomandi - hava verið umrøddir. Eftir drúgva viðgerð er nevndin samd um at fara lagaliga til verka, soleiðis at feløg og leikarar hava góðan møguleika at tillaga seg broytingarnar.

At feløgini eru tilreiðar at taka ímóti hesum broytingum, kom týðiliga til sjóndar á árliga fundinum beint eftir kappingarlok. Tað varð, og er, mín greiða fatan, at flest allir í góðu sína áskoðan til kennar, vóru samdir um, at tað er neyðugt at fremja broytingar, skulu vit menna okkum leikliga framyvir.

Tankin um at byrja kappingina í august og leika út í oktober er eisini áhugaverdur, og eri eg samdur við Petur Simonsen í, at hesin leistur hóskar seg betur til evropeisku luttøkuna og dagsformin hjá liðunum. Vit hava tó Ð- tilvita - valt, ikki at fremja eina so víðgongda broyting í fyrstu atløgu, men heldur fara undir eina meira lagaliga tilgongd.

Limirnir í Kappingarnevndini, saman við umsitingini hjá Fótbóltsambandinum, eru í ferð við at leggja kappingarskránna fyri komandi ár tilrættis. Tá henda er liðug, vónandi innan komandi tvær vikurnar, verður hon send feløgunum til ummælis.

Tað at vit nú leingja kappingina viðførir sjálvsagt at vit mugu endurskoða skipanina við leikbanni. Kappingarnevndin hevur tilevna uppskot um at leingja talið av kortum tilsvarandi longdu kappingini.

Eg havi seinastu tíðina, afturvendandi, hoyrt útsagnir um, at ætlaðu broytingarnar, av landskappingini, skulu góðkennast av aðalfundinum hjá Fótbóltsambandi Føroya í februar 2005. Her havi eg hug at knýta nakrar viðmerkingar til útsagnirnar.

Aðalfundurin velur limirnar í nevndina fyri Fótbóltsamband Føroya. Gera valdu limirnir ikki sítt arbeiðið til lýtar, kunnu teir skiftast út annað hvørt ár. Herumframt skal ein aðalfundur góðkenna lógarbroytingar, ið knýta seg at virkseminum hjá Fótbóltsambandinum.

Men at taka sær av, at tilrættisleggja kappingarskipanina, umframt umsitingarliga partin annars, hava valdu nevndarlimirnir fulla ábyrgd av, og tilsvarandi heimild til, at fremja í verki. Og sjálvsagt skal nevndin arbeiða við, og fremja broytingar, ið vit trúgva uppá kann menna føroyskan fótbólt sum heild. Talan er ikki um nakra lógarbroyting á økinum.

Tá talan hinvegin er um at gera broytingar í skipanini við leikbanni, skulu hesar leggjast fyri aðalfundin til støðutakan, og tað vera tær sjálvsagt eisini, sambært galdandi mannagongdum.

Eg eri sannførdur um, at tíðin er búgvin til ætlaðu broytingarnar. Gamaní kunnu vit halda áfram við at tosa um, at gera broytingar Ð- og tað skulu vit eisini Ð- men bert at tosa, og skriva álit, flytir okkum ikki framá. Skulu vit menna føroyskan fótbólt, mugu vit seta gerð aftan orðini. Tástani kunnu vit staðfesta, hvørs vit eru á rættari leið, ella vit eru noyddir at saðla um.

Við vón um eitt ítróttarligt gott 2005.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.